

## Stasi dyrgdi eftir Merkel

Loyniliga løgreglan í gamla Eysturtýsklandi, Stasi, royndi at fáa fatur á Angelu Merkel, tá hon søkti um starv á einum lærdum háskúla. Men Angela segði nei, og hon fekk heldur ikki starvið. Í samrøðu við sjónvarpið ARD sigur Angela Merkel, sum gjørdist týskur kanslari í 2005, at hon gjørdi einum fulltrúa hjá Stasi greitt beinanvegin, at hon hevði ikki hug at arbeiða fyri ta loyniligu tænastuna. Angela Merkel, sum er útbúgvin alisfrøðingur, sigur í samrøðuni, at hon hevði væntað, at Stasi fór at seta seg í samband við seg, og at hon hevði fyrireikað seg til at siga nei.

## Pólverjar vilja hava evruna

Tann ógvusliga fíggjarkreppan hevur ikki fingið polsku stjórnina at sleppa ætlanini um at seta evruna í gildi sum polskt gjaldoyra. Jan Vincent-Rostowski, fíggjarmálaráðharri, ásannar kortini, at kreppan fer helst at hava við sær, at avgerðin um evruna verður útsett eitt sindur, og tí væntar hann, at Pólland kann sleppa upp í evrusamstarvið í 2012. Í samrøðu við Financial Times sigur polski ráðharrin, at Pólland er ikki so skuldarbundið sum eitt nú Bretland og Ungarn, og at stjórnin hevur ongar ætlanir um at leggja størri skuld á ríkiskassan, meðan bíðað verður eftir evruni.

# Enniberg bestu veiðu nakrantíð

**Sonny Johannesen sigur, at tey 1500 tonsini, sum teir fingu við Ennibergi fram til 4. mai í ár, er nógv tann størsta nøgdin, sum skipið hevur fiskað eftir so stuttari tíð. - Jú, vit eru sera væl nøgdir við veiðina hesar báðar túrarnar í ár, sigur skiparin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit hava ongantíð fiskað so nógv eystanfyri upp á so stutta tíð sum í ár, sigur skiparin, Sonny Johannesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Fakatrolarin Enniberg hevur gjørt tveir góðar túrar eystanfyri í ár, og nú er skipið í Irmingarhavinum á kongafiskaveiði.

Á báðum túrunum eystanfyri hevur royndi skiparin, Sonny Johannesen, staðið á brúnni, og nú skipið er á kongafiskaveiði, er glyvramaðurin, Dávur Jacobsen, á brúnni.

Dávur er annars stýrimaður hjá Sonna, og tá skiparin er í landi, er glyvramaðurin á brúnni.

Í Barentshavinum eru teir vanliga 35 mans við skipinum, men nú teir eru í Irmingarhavinum, er manningartalið 25.

### Góð fiskiveiða

Enniberg fór fyrra túrin í ár hin 29. desember, og teir vóru aftur í Føroyum 7. mars. Hetta var túrurin, har norðmenn róku føroysku flakatrolararnar úr aftur norskum sjógvi, tí tað dróg út at finna semju um sínámillum fiskiveiðisáttmálan landanna millum.

Skipini, sum vóru byrjað at fiska í norskum sjógvi, fóru í gráu leiðina, har fiskiskapurin at enda gjørdist rættiliga góður. Tá so sáttmálin millum Føroyar og Noreg kom upp á pláss, fóru skipini aftur í norskan sjógv.

Sonny Johannesen sigur, at teir hendan túrin høvdu sløk 900 tons, og tá var skipið smekkfult, sum hann tekur til.

- Vit hava havt meira enn 900 tons í Ennibergi, men hendan túrin høvdu vit nokso nógv einkultfløk, sum fylla nógv í rúgvu. Tá tað nógva hevur verið blokkur, gongur meira í skipið, sigur hann.

Enniberg var sum nevnt heima aftur hin 7. mars, og eftir at hava verið í Bretlandi og lagt veiðina upp, fóru teir avstað aftur hin 17. mars. Teir vóru aftur í Føroyum hin 4. mai við umleið 600 tonsum. Hesin seinni túrurin eystanfyri var soleiðis lutfalsliga stuttur.

- Hendan seinna túrin áttu vit nakað av kvotu eftir hjá norðmonnum. Tá vit høvdu fiskað hesa norsku kvotuna, fóru vit í gráu leiðina, har veiðan eisini royndist væl.

Sonny sigur, at hesi 1500 tonsini, sum teir fingu við Ennibergi fram til 4. mai í ár, er nógv tann størsta nøgdin, sum skipið hevur fiskað eftir so stuttari tíð.

- Jú, vit eru sera væl nøgdir við veiðina hesar báðar túrarnar, leggur skiparin aftrat.

Hann ásannar, at prísirnir fyri lidnu vøruna í Bretlandi hava verið munandi lakari í ár enn eitt nú í fjør, men heldur, at seinna lastin verður farin fyri ein heldur frægari prís.

Hetta venda vit aftur til í greinastubbanum niðanfyri.

### Veiðiskipanin

Sonny Johannesen sigur, at skipanin í Barentshavinum er hon, at tá kvota er eftir hjá norðmonnum, og føroysku skipini kortini eru í gráu leiðini, fer helmingurin av tí, sum veitt verður í gráu leiðini, burtur av kvotuni, sum vit sambært avtalu hava við norðmenn og russar.

- Tá kvotan í norskum sjógvi er liðug, og vit hava meldað okkum av listanum í norskum sjógvi, kunnu vit aftur fiska í gráu leiðini.

Hann sigur, at tá føroysku skipini bara eiga kvotu eftir í russiskum sjógvi, kunnu tey fiska kvotuna í russiskum sjógvi, Gráu leiðini ella í Loynikrókinum.

- Tá so heildarkvotan hjá norðmonnum og russum er liðug, er alt liðugt, sum Sonny tekur til.

### Irmingarhavið

Skiparin sigur, at høvdu flakatrolararnir ikki havt kongafiskin í Irmingarhavinum, høvdu skipini noyðst at ligið leingi fyri einki.

- Jú, kongafiskurin er eitt gott íkast, og hann hevur eisini víst seg at verið meira støðugur í prísi, nú serliga bretski marknaðurin hevur havt lágar prísir. Kongafiskurin fer á aðrar marknaðir, og hetta er ein orsøkin til, at hann hevur hildið prísin betri, sigur Sonny Johannesen.

Umborð á Ennibergi verður kongafiskurin skráskorin og frystur.

Tá kongafiskatúrurin í Irmingarhavinum er av, eigur Enniberg eina minni kongafiskakvotu eftir norðanfyri, og síðan er nakað av kvotu eftir hjá russum.

Um hálvan september er væntandi, at Enniberg er liðugur við alla sína kvotu í ár.

# Hava tjent yvir 300.000 higartil í ár

**Um seinna lastin hjá Ennibergi verður seld fyri ein heldur frægari miðalprís enn hin fyrra, fer manningarparturin helst at liggja um einar 300.000-350.000 krónur higartil í ár**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At dekkaraparturin hjá manningini við Ennibergi liggur millum 300.000-350.000 krónur higartil í ár, eru ikki endaligu orðini hjá Sonna Johannesen, skipara.

Tá vit spyrja hann, hvat tey tilsamans 1500 tonsini, sum skipið hevur fiskað í Barentshavinum higartil í ár, geva í manningarhýru, er hann varin.

- Vit vita ikki endaliga talið enn, tí seinni túrurin er ikki endaliga gjørdur upp enn.

Hin fyrra túrin, har veiðan var sløk 900 tons, seldi skipið fyri heilar 10 miljónir krónur minni, enn selt hevði verið fyri bara einum ári síðan.

- Vit fingu einar 20 miljónir krónur fyri hesa last, men høvdu helst fingið einar 30 miljónir krónur, um sama veiða varð seld eitt ár frammanundan.

Sonny sigur seg tó hava varhugan av, at seinni túrurin lutfalsliga hildnaðist betri í sølu.

- Líkt er til, at prísirnir nú eru heldur frægari enn teir hava verið.

Skiparin vísir á, at pundið hevur verið lágt, og at hetta hevur ávirkað prísirnar fyri lidnu vøruna negativa vegin.

- Pundið fall niður um 8 krónur í ár, men í fjør lág tað upp ímóti 11 krónum, sigur hann.

Tá vit aftur spyrja Sonna Johannesen, hvussu hann metir hýrupartin fyri hesar báðar túrarnar, fáa vit hann kortini at siga, at hugsandi er, at dekkaraparturin fer at liggja um einar 300.000-350.000 krónur.

- Tað sær heldur frægari út við prísi, nú henda seinna lastin verður seld, men enn kunnu vit einki siga við vissu, sigur Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi.